## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri, um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Kvøldlot reist aftur



*Bygningurin, har Kvøldlot fyrr helt til, er nú farin at líkjast. Nógv virksemi var í bygninginum fyrrapartin hósdagin*
*MYND: Jens Kr. Vang*

**Gamli náttklubbin Kvøldlot í Havn hevur verið stongdur í fleiri ár, men nú skal virksemi aftur vera í bygninginum**

BYGGIVIRKSEMI
*Stefan í Skorini*

Tað er Høgni Danielsen, ið eigur bygningin og er farin undir at umvæla hann. Nú er bygningurin endiliga farin at líkjast. Fyrrapartin hósdagin vórðu jarnstólpar settir á bygningin.

Ætlanin hjá honum er at hava matstovu og dansihøli í bygninginum. Matstovan skal eita Maxim, og dansihølið verður væntandi nevnt Royal Club. Sum nøvnini benda á, so verður hetta staðið í fínara endanum. Væntandi fer eigarin at leggja seg eftir at fáa meira tilkomin fólk á vitjan.

Nógv ár eru síðani at Kvøldlot stongdi, og síðani hevur einki verið í bygninginum. Langt um leingi sær nú út til, at fólk aftur kunnu vitja í tí gamla náttklubbanum. Enn er ógreitt júst nær latið verður upp.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | 18 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 14 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 30 |
| Kiev | 30 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 32 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 24 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | |
| Panama | 28 |
| La Paz | 2 |
| Rio de Janeiro | |
| Buenos Aires | 9 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa við Bergen fer í útnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið yviri á Eysturlandinum fer spakuliga í útnyrðing. Eitt lágtrýst yvir Atlantshavinum á 51N-41V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar sunnunáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/07 kl. 06⁰⁰– 11/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 11,1°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 10/07 kl. 06⁰⁰– 11/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 6,5 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. juli | 09.06 | 21.32 | 08.06 | 20.32 | 08.21 | 20.47 | 11.06 | 23.32 | — | 12.06 | 07.21 | 19.47 | 06.21 | 18.47 | 09.21 | 21.47 | 10.21 | 22.47 | 08.51 | 21.17 | 10.06 | 22.32 |
| 13. juli | 09.56 | 22.21 | 08.56 | 21.21 | 09.11 | 21.36 | 11.56 | — | 00.32 | 12.56 | 08.11 | 20.36 | 07.11 | 19.36 | 10.11 | 22.36 | 11.11 | 23.36 | 09.41 | 22.06 | 10.56 | 23.21 |
| 14. juli | 10.44 | 23.07 | 09.44 | 22.07 | 09.59 | 22.22 | 00.21 | 12.44 | 01.21 | 13.44 | 08.59 | 21.22 | 07.59 | 20.22 | 10.59 | 23.22 | 11.59 | — | 10.29 | 22.52 | 11.44 | — |
| 15. juli | 11.31 | 23.56 | 10.31 | 22.56 | 10.46 | 23.11 | 01.07 | 13.31 | 02.07 | 14.31 | 09.46 | 22.11 | 08.46 | 21.11 | 11.46 | — | 00.22 | 12.46 | 11.16 | 23.41 | 00.07 | 12.31 |
| 16. juli | — | 12.19 | 11.19 | 23.42 | 11.34 | 23.57 | 01.56 | 14.19 | 02.56 | 15.19 | 10.34 | 22.57 | 09.34 | 21.57 | 00.11 | 12.34 | 01.11 | 13.34 | — | 12.04 | 00.56 | 13.19 |

Kelda. Álmanakkin 2002


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212






BLÓÐBANKIN
Telefon 311397



...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT
Spf.


5 707265 100050 >